# Tvær ferðir í hvørjum staðnum

**Í Fótbóltssambandinum hava teir gjørt av, at Írland og Ísrael skulu spæla í Havnini og Sveis og Kypros á Toftum**

LANDSDYSTIR
*Jóannes Hansen*


*Føroyska landsliðið, sum her venur í Týsklandi, sleppur í komandi ári at royna seg tvær ferðir á Svangaskarði og tvær ferðir á Tórsvølli í HM-undankappingini*
*savnsmynd*

Tað hevur leingi verið greitt, at tá ið Frakland kemur henda vegin mikudagin 8. september, so skal tað ganga fyri seg í høvuðsstaðnum og á Tórsvølli.

Dysturin ímóti Fraklandi verður tann einasti HM undankappingardysturin á heimavølli í ár. Tríggir útidystir eru á skránni. Tann fyrsti verður leygardagin frammanundan heimadystinum ímóti Fraklandi. Leygardagin 4. september skulu føroyingar til Sveis. Leygardagin 9. oktober skulu Føroyar spæla á Kypros, og mikudagin 13. oktober er Írland í Dublin á skránni.

Í hesum mánaðinum er ein vinardystur á skránni. Sambært tíðindablaðnum hjá FSF, sum var givið út til Ólavsøku, so er ætlanin, at heimadysturin ímóti Malta mikudagin 18. august skal spælast á Svangaskarði.

Føroyar og Malta hava eina ferð áður dystast á Svangaskarði. Tað var sunnudagin 8. juni í 1997. Tann dysturin var minnisríkur á so mangan hátt. Føroyar vunnu 2–1, og Uni Arge og Todi Jónsson gjørdu málini. Ikki minst Jan C. Dam minnist ivaleyst fyri sjey árum síðani, tá ið hann beinanvegin í 2. hálvleiki sá reytt, tí dómarin metti, at hann á strikuni hevði bjargað við arminum.

Eitt annað, sum tann dysturin er minnisríkur fyri, er, at áskoðarafjøldin ta ferðina var so mikið stór, sum hon hvørki hevur verið fyri ella síðani. 6.642 áskoðarar vóru eygnavitni. Hetta er framvegis áskoðarametið í Føroyum.

Á Malta hava teir longu sent boð eftir 27 spælarum, sum teir vilja hava at vera við í fyrireikingunum til vinardystin í Føroyum og serliga til fyrsta HM undankappingardystin, sum Malta skal spæla á heimavølli ímóti Svøríki 4. september.

Frá 7. og til 15. august skal maltesiska landsliðið á venjingarlegu í Sveis. So tað kann ikki roknast við øðrum, enn at maltesararnir vera væl trimmaðir, tá ið teir koma beinleiðis úr Sveis og henda vegin.

### Tveir á hvørjum staðnum

Næsta ár verður í landsliðshøpi størri ferðsla her á landi, enn hon verður í hesum árinum. Fýra HM undankappingardystir á heimavølli eru á skránni, og FSF ætlar, at tveir skulu spælast á Toftum og tveir í høvuðsstaðnum.

FSF ætlanirnar eru, at Írland og Ísrael skulu spæla á Tórsvølli, og at Sveis og Kypros skulu spæla á Svangaskarði.

Sveis skal vitja á Svangaskarði leygardagin 4. juni, og mikudagin 8. juni fer Írland at spæla á Tórsvølli. Mikudagin 17. august skal Kypros spæla á Toftum, og mikudagin 7. september skal Ísrael spæla í Havnini.

Tann einasta av hesum fýra fótbóltstjóðunum, sum ikki hevur vitjað í Føroyum áður, er Írland. Kypros, Sveis og Ísrael hava áður verið í Føroyum. Ísrael og Føroyar spældu 1-1 í venjingardysti í morgin fyri tólv árum síðani, Kypros vann 2-0 16. juni í 1992, og Sveis vann 2. juni í 2001 1-0. Hesir tríggir dystirnir vórðu allir spældir á Svangaskarði.

Landsliðið skal komandi ár spæla tveir HM undankappingardystir á útivølli. Tann fyrri verður í Fraklandi leygardagin 3. september, og tann seinni verður á útivølli ímóti Ísrael leygardagin 8. oktober. Um tann dysturin verður í Ísrael ella onkra aðra staðni verður neyvan greitt fyrrenn eina ferð næsta ár. Fyri Ísrael er tað sjálvandi ynskiligt, at tað verður spælt á heimavøllinum hjá teimum. Nógvu tey seinastu árini hevur tað verið soleiðis, at FIFA og UEFA orsaka av spentu politisku støðuni hava flutt dystir úr Ísrael og til aðrar vallir.

## Norðurlendskur fótbóltsfundur í Føroyum

Umboð fyri norðurlendsku fótbóltssambondini fara á fundi í Føroyum hósdagin í komandi viku at hava fund í Føroyum. Fundast verður serliga um graslíki, og tað kann verða rættuliga áhugavert hjá føroyingum at hoyra, hvussu tað verður við tí sonevnda »3. generatións« graslíkinum, sum er á fleiri vøllum í Føroyum.

Bæði FIFA og UEFA hava viðgjørt hetta slagið av graslíki, og væntandi gongur ikki long tíð, áðrenn tað verður loyvt feløgum at spæla sínar dystir á slíkum grasi. FSF hevur tí bjóðað øllum teimum føroysku fótbóltsfeløgunum og avvarðandi kommunum við á fundin í FSF-húsinum, har tey kunna frætta nærri um hetta evni.

**tn**

# Christian skorar framvegis

**Men tað hjálpti lítið hjá landsliðsspælaranum, sum legði rygg til trivaligt tap á útivølli í fyrsta umfarinum**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Hann kom sum eitt skot á føroyska fótbóltskortið fyri meiri enn einum ári síðani. Men seinastu tíðina hevur lítið verið at hoyrt til hansara, og spurningurin er nú, um hann yvirhøvur er inni í landsliðshitanum. Tað fer ivaleyst ábending at fáast um heilt skjótt.

Tað er Christian Lamhauge Holst, sum hetta snýr seg um. Álopsmaðurin við føroyskari mammu er framvegis í Lyngby, sum eisini er felagið, har landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, hevur sína dagligu gongd.

Lyngby er í triðju bestu donsku deildini í Danmark. Teir fóru í vikuskiftinum undir nýggja kappingarárið. Lyngby var í Odense, har teir hittu gamla stórfelagið B 1913, sum fyrr í summar flutti niður.

Christian Lamhauge Holst og liðfelagarnir noyddust til hús aftur sum av torvheiðum. Heimaliðið vann 4-1. Einsamalla málið hjá Lyngby skoraði Christian Lamhauge Holst stutt undan steðginum. Tá gjørdist støðan 1-1, men áðrenn teir fóru at hvíla seg, hevði B 1913 lagt seg framum aftur, og í 2. hálvleiki skoraðu teir tvey mál afturat.



# Bæði fara eftir sigrinum

**Um VB og NSÍ ætla sær at bíta seg fastan í oddastríðnum, er neyðugt at vinna dystin sínamillum í Vági í kvøld, og tí fara bæði liðini eftir øllum trimum stigunum.**

VB-NSÍ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Lagt er upp til ein spennandi dyst í Vági í kvøld, tá ið runavíkingar koma suður á vitjan. Tá ið liðini hittust í Runavík við kappingarbyrjan, endaði tað við javnleiki 1-1. Dystirnir millum VB og NSÍ eru ofta rættuliga tættir, og í kvøld verður neyvan nakað undantak.

### Dalius kemur ikki aftur

Hjá vágbingum sær tað gott út, nú farið verður undir seinnu hálvu. VB hevur verið á venjingarlegu í Danmark, og liðskiparin hjá VB, Eyðun Jacobsen, sigur, at venjingarlegan royndist stak væl. - Vit eru sera væl fyri, nú farið verður undir landskappingina aftur, sigur hann.

Tað er greitt, at annar litavin hjá VB, Dalius, ikki verður við aftur í ár. Hann gjørdist sjúkur fyrr í ár, og er ongantíð komin fyri seg. Síðani Dalius fyrr í summar kom aftur til Litava, hevur hann enn einaferð verið innlagdur, og av tí at einki útlit eru fyri, at Dalius verður førur fyri at spæla fótbólt aftur í hesum kappingarárinum, er gjørt av, at hann verður verandi í Litava. Danin Brian Andresen, ið var við á VB-liðnum tveir teir seinastu dystirnar undan summarsteðginum, er farin aftur til Danmarkar, og hann verður tí heldur ikki við á liðnum hjá vágbingum. Somuleiðis verður Jákup Olsen heldur ikki við, tí at hann er skaddur.

### Jákup Emil skal aftur royna seg

Hjá runavíkingum ræður tað nú um at reisa seg eftir ósigurin í steypafinaluni Ólavsøkudag. NSÍ noyðist tó at verða sín royndasta leikara, Jens Martin Knudsen, fyriuttan, tí at hann fekk reyða kortið í finaluni. Avloysarin hjá Jens Martini í finaluni, Jákup Emil Hansen, sleppur tí enn einaferð at royna seg í málinum hjá runavíkingum, og so verður spennandi at síggja, um hann fer at standa seg eins væl sum í steypafinaluni.

Ein av berandi kreftunum á miðvøllinum hjá NSÍ, Ian Højgaard, fekk ein skaða undir venjing mánakvøld, og hann verður neyvan við í Vági í kvøld. Hinvegin kunnu runavíkingar fegnast um, at sterki vongverjin í vinstra borði, Sjúrður Jacobsen, nú er tøkur aftur, eftir at hann hevur verið leikbannaður tveir teir seinastu dystirnar. Óli Hansen hevur eisini havt ein smásnudd, men hann verður væntandi við í kvøld.

Ein av teimum yngru leikarunum hjá NSÍ, ið veruliga hevur gjørt vart við seg í ár, er Andy Olsen. Hann sigur, at sjálvandi eru runavíkingar vónbrotnir um steypaósigurin, men hann sigur tó, at teir nú bara hyggja frameftir, og teir fara til Vágs eftir øllum trimum stigunum. Tó heldur Andy Olsen, at teir møguligani kunnu liva við einum javnleiki, hóast tað merkir, at teir óivað missa eitt lítið fet í oddastríðnum.


*Tað kemur væl við hjá runavíkingum, at sterki vongverjin í vinstra borði, Sjúrður Jacobsen, nú er aftur á liðnum, eftir at hann hevur verið leikbannaður tvær tær seinastu ferðirnar*

## Dystaryvirlit

04.08.2004 19.00 HB-Skála
Dómari: Lassin Isaksen

04.08.2004 19.00 VB-NSÍ
Dómari: Birgir Sondum

# Havnarmenn vilja hava hevnd

**Oddaliðið HB vil í kvøld hava hevnd fyri einasta ósigurin higar til í landskappingini, tá ið Skála kemur á vitjan í Gundadali til eitt veruligt oddabrak**

ODDABRAK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Lagt er upp til eitt ordans oddabrak í Gundadali í kvøld, tá ið oddaliðið HB fær vitjan av Skála, sum er næstfremt í føroysku landskappingini. Tá ið liðini bæði hittust í fyrsta landskappingardystinum á árinum inni á Skála, vóru skálamenn heldur óvætnað við yvirlutan og vunnu 3-1 á føroyameistarunum. Hetta var tó einasti ósigurin hjá HB higartil í landskappingini, og einki er at ivast í, at nýklaktu steypavinnarararnir ætla sær at hevna ósigurin í kvøld.

### Ivi um Paula

Hjá skálamonnum er greitt, at teir noyðast at verða onkrar leikarar fyriuttan. Miðvallarin Julian Florescu er leikbannaður til dystin í kvøld, og harafturat er stórur ivi um liðskiparan hjá Skálamonnum, Paula G. Hansen, ið leingi hevur havt ein skaða at dragast við. Um so er, at Pauli ikki verður við, er tað ein sera stórur missur hjá skálamonnum, tí hann er ein lyklaleikari hjá teimum. Arnhold Berg vandi ikki mánakvøldi, tí hann hevði trupulleikar við nakkanum, men hann verður væntandi klárur til dystin í kvøld. Somuleiðis er greitt, at málverjin, Bjarni Igor Kostic, ið meiddi sær hondina í fyrru helvt, nú er klárur aftur, og tí verður hann væntandi millum stengurnar í kvøld.

Pauli G. Hansen sigur, at út frá dystinum ólavsøkuaftan, tá ið Skála vann sannførandi 5-1 á KÍ, eru vónirnar góðar undan dystinum í kvøld, men hinvegin hevur tað ikki gingist so væl í øðrum venjingardystum. Somuleiðis heldur liðskiparin hjá Skála, at tað er ein ógvuliga trupul uppgáva í kvøld, tí HB tykist verða í stórformi, og teir eru ikki lættir at syfta í Gundadali, sigur hann.

Spurdur um Skála ætlar at leggja seg aftur á vøllin og bíða eftir møguleikanum fyri at sláa kontra, sigur Pauli G. Hansen, at tað væntar hann ikki. - Tað liggur ikki til okkum at spæla verjukent, tí vit hava allir so góðan hug til at leypa á, sigur hann.


*Tað er stórur missur hjá skálamonnum, um teir noyðast at verða sterka liðskiparan, Paula G. Hansen, fyriuttan, tá ið teir í kvøld skulu spæla oddadyst móti HB í Gundadali.*
*mynd: Álvur Haraldsen*

### Eingin Hallur

Hjá HB eru vónirnar góðar undan dystinum í kvøld. Greitt er, at veteranurin Hallur Danielsen ikki verður við, tí at hann er leikbannaður. Væntandi verður liðið tí umskipað eitt vet, soleiðis at Jan Dam kemur inn í miðverjuna, meðan Vagnur M. Mortensen glíður út á høgra bakkplássið, sum Hallur vanliga røkir. Jákup á Borg var ikki við í finaluni á ólavsøku, men hann verður allarhelst á beinkinum í kvøld. Ivi er eisini um leikandi venjaran, Heine Fernandez, men sum skilst verður hann allarhelst við í oddabrakinum.

Jákup á Borg, sum sjálvur ikki var við, tá ið HB tapti á Skála, sigur, at teir eru ógvuliga uppsettir upp á dystin í kvøld. - Vit sóu Skála spæla ólavsøkuaftan, har teir smurdu KÍ av, og teir eru ikki nummar tvey av ongum, sigur landsliðsmaðurin og leggur afturat, at teir hava sera stóra virðing fyri skálamonnum. Tó heldur Jákup á Borg, at HB eigur at basa Skála í kvøld, og undir teimum báðum venjingunum, sum HB hevur havt síðani steypafinaluna, hava menn tosað óført um dystin í kvøld, og tað er greitt, at menn eru ógvuliga uppsettir upp á hevnd, sigur Jákup á Borg.